HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

6. september 2018
**Mál**: 18/00647-8
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

***Góðkenningarskriv***

**Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1119a undir Gráasteini**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna við skrivi, dagfest 29. juni 2018, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1119a undir Gráasteini til góðkenningar.

Ætlanin er at byggja 22 íbúðir, umframt felags fríøki, p-pláss o.a. Økið liggur á A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Broytingin hevur ligið alment frammi frá 16. mai til 27. juni 2018. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli sínum, dagfest 10. juli 2018, til, at umbønin verður gingin á møti.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 1119a undir Gráasteini.

Hjálagt byggisamtyktartekstur og kort við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

## SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI MATR. NR. 1119a, UNDIR GRÁASTEINI, TÓRSHAVN

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

### §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, matr. nr. 1119a, undir Gráasteini í Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

### §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bústaðarbygging á økinum.

Stk. 2. Útstykkingin er 4855 $m^2$ til støddar og liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Útstykkingin hevur fríøki og felags parkeringspláss.

Stk. 4. Vegir, felagsøkir og gøtur skulu gerast samsvarandi kortskjali 2.

Stk. 5. Sambært kap. IV, §5, stk. 9 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett at í serstakari byggisamtykt fyri eitt náttúrliga avmarkað øki kann verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 6. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

### §3 NÝTSLA ØKISINS

Økið skal nýtast til bústaðir. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í Umhvørvisflokking fyri Vinnustykkir í Tórshavnar kommunu, samtykt av býráðnum 19. februar 2009, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum.

### §4 VEGIR

Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

## §5 GØTUR, FRÍØKIR OG FELAGS PARKERINGSØKIR

Kortskjølini vísa, hvar gøtur, fríøkir og felags parkeringsøkir skulu staðsetast.

Stk. 2. Gøtur og fríøki sum er lagt av til spælipláss skulu planerast og hava fasta álegging.

## §6 BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

Í samband við byggistig og nýtslustig verður víst til almennu byggisamtyktina.

Stk. 2. Byggjast skulu 22 íbúðir innanfyri økið í kortskjali 2, skipan av økinum.

Stk. 3. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §5 ÚTSJÓND HÚSANNA

Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6 BYGGING IÐ ER

Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Stk. 2. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## §7 BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggimyndugleikin og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8 UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 18/00647 |
| Ætlanarskriv: | 31/8-2018 |
| Góðkent: | 6/9-2018 |
| Váttað: | |




| HEI... ...LENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál n... | 18/00647 |
| Ætla... | 31/8-2018 |
| Góð... | 6/9-2018 |
| Vátt... | [signature] |

**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr, 1119a undir Gráasteini, Tórshavn | | | | |
| **Undirheiti** | Skipan av økinum | | | | |
| **Tekning nr.** | 2 | | | | |
| **Dagur** | 31.08.18 | **Mát** | 1:500 | **Tekna** | RVH |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1119a undir Gráasteini, Tórshavn | | | | |
| **Undirheiti** | Yvirlitskort | | | | |
| **Tekning nr.** | 1 | | | | |
| **Dagur** | 31.08.18 | **Mát** | 1:3000 | **Tekna** | RVH |